# Børn og hønur á Sandi

**– Børnunum dámar ógvuliga væl at hava hønur í garðinum. Tey hava jú sæð tær, síðani tær vóru ung-ar, sigur Randi Joen-sen, leiðari í barna-garðinum**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*

Eisini í barnagarðinum á Teigi á Sandi tók verkfallið broddin á jólafyrireikingunum. Okkurt jólaprýði er tó gjørt, og vindeyguni á stovninum eru øll prýdd við sprossum og eftirgjørdum kava.

Mánadagin vóru øll børnini til barnagudstænastu, týsdagin gjørdu børnini, sum fara í skúla komandi ár, jólaprýði og prýddu jólatræið. Í dag verður jólahald á stovninum fyri øllum børnunum. Jólasøla verður eisini, ætlað foreldrum, ommum, abbum, og øðrum, har ymiskt børnini hava gjørt verður selt, so sum tekningar, lutir og annað. Peningurin, sum kemur inn, fer til keyp av borði og bonkum til garðin. Í garðinum er nakað bert, treyðugt so eru tó hønur. Og ein hani, sum vera man, og hann hoyrist um allar geilar, skilst.

– Børnunum dámar ógvuliga væl at hava hønur í garðinum. Tey hava jú sæð tær, síðani tær vóru ungar. Tey støðast væl í hesum umhvørvinum, sigur Randi Joensen, leiðari í barnagarðinum.

Barnagarðurin á Sandi er nýggjur, frá februar í ár. Stovnurin er normeraður til 30 børn, men av tí at nógv børn eru hálva tíð, hava 40 børn fingið pláss, tíggju teirra eru vøggustovubørn og tey halda til í kjallaranum. Øll børnini eru úr bygdini, uttan eitt, sum er úr Húsavík. Sum skilst standa tíggju børn á bíðilista eftir at sleppa inn á stovnin. Níggju starvsfólk eru, bert leiðarin hevur útbúgving sum pedagogur.


*Børnini eru góð við hønurnar, og hanan, hóast hann er nakað mælskur* — Mynd: Jens Kristian Vang

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, sum út á dagin hækkar upp í útnyrðing. Skýggjað og regn við hita millum 2 og 6 stig. Um náttina hvassur vindur upp í skrið av norði við kava og heglingsælingi. Hhitin fellur til umleið 1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi upp í skrið av norði, seinni minkandi niður í gul til stívt andøvsgul. Kavi ella heglingsælingur men eisini onkrir sólglottar. Um náttina lot til andøvsgul. Skýggjað og møguliga nakað av kava. Hitin um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul, fyri tað mesta av landsynningi. Av og á nakað av avfalli, helst sum vátaslettingur og regn. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið jólaaftan:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði. Kavi og heglingsælingur. Hitin millum frostmarkið og 3 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | ÷5 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷15 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷6 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 7 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 3 |
| Malta | 9 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

### LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst vestan fyri Írland hvørvur í ein vestan. Eitt lágtrýst við landnyrðingspartin av Grønlandi fer í ein landsynning og kemur framvið í ein landnyrðing úr Føroyum hósdagin.



Kaldur norðanvindur við kavaæli kemur síðani inn yvir oyggjarnar, men tollaksmessudag fer eitt nýtt lágtrýst av leiðunum undan Íslandi móti Skotlandi.

### HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,6°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ



Avfallið: 0,7 mm – mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 55,8 mm




BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

14. des.: Tendring
21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. des | 10.47 | 23.08 | 09.47 | 22.08 | 10.02 | 22.23 | 00.26 | 12.47 | 01.26 | 13.47 | 09.02 | 21.23 | 08.02 | 20.23 | 11.02 | 23.23 | — | 12.02 | 10.32 | 22.53 | 11.47 | — |
| 21. des | 11.28 | 23.48 | 10.28 | 22.48 | 10.43 | 23.03 | 01.08 | 13.28 | 02.08 | 14.28 | 09.43 | 22.03 | 08.43 | 21.03 | 11.43 | — | 00.23 | 12.43 | 11.13 | 23.33 | 00.08 | 12.28 |
| 22. des | — | 12.19 | 11.19 | 23.51 | 11.34 | — | 01.48 | 14.19 | 02.48 | 15.19 | 10.34 | 23.06 | 09.34 | 22.06 | 00.03 | 12.34 | 01.03 | 13.34 | — | 12.04 | 00.48 | 13.19 |
| 23. des | 00.51 | 13.22 | — | 12.22 | 00.06 | 12.37 | 02.51 | 15.22 | 03.51 | 16.22 | 11.37 | — | 10.37 | 23.09 | 01.06 | 13.37 | 02.06 | 14.37 | 00.36 | 13.07 | 01.51 | 14.22 |

5 707265 100043 >